# Krógva seg aftanfyri vágbingar

**Býráðslimir á Tvøroyri halda, at tað eru tær beru kávalótir, tá ið smáu kommunurnar í Suðuroy siga, at tær vilja leggja alla oynna í eina kommunu**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tá ið tær smáu kommunurnar tosa um samanlegging, eru tað tær beru kávalótir og hetta er onki annað enn at krógva seg aftanfyri Vágs Býráð, segði ein hvassorðaðu Bergur Bærendsen á býráðsfundi á Tvøroyri mikudagin*

– Tað er tað bera kávalótir, tá ið smáu kommunurnar í Suðuroy siga, at tær vilja leggja alla Suðuroynna í eina kommunu.

Tað heldur Bergur Bærendsen, býráðslimur á Tvøroyri.

Á býráðsfundi á Tvøroyri seinnapartin mikudagin, varð nógv tíð brúkt uppá at umrøða støðuna í Suðuroy eftir at Løgtingið leygardagin gjørdi av at byggja skúladepil í Hovi, hóast meirilutin av Vágs Býráði og Tvøroyrar Býráð mælti til at byggja skúlarnar í Vági og røktarheimi á Tvøroyri. Afturfyri skuldu kommunurnar í oynni taka samráðingar upp um at leggja alla Suðuroy í eina kommunu.

Tað mettu býráðslimir á Tvøroyri vera eitt serligt frambrot í Suðuroy, tí higartil hevur Vágs Býráð ikki viljað hoyrt talan um at leggja alla oynna í eina kommunu.

Samstundis gjørdi Vágs Býráð greitt, at verður skúladepilin ikki bygdur í Vági, dettur alt tos um samanlegging burtur.

### Tann beri sjónleikur

Á býráðsfundinum á Tvøroyri mikudagin varð enn einaferð staðfest, at tað tað er fremsta áhugamál hjá Tvøroyrar býráðið at leggja alla oynna í eina kommunu. Men í hesum sambandi fingu tær smáu kommunurnar av at vita.

Bergur Bærendsen vísti á, at Tvøroyrar Býráð hevur arbeitt í fleiri ár fyri at fáa alla oynna lagda saman í eina kommunu.

– Men vit hava onki veruligt svar fingið frá teimum smáu kommununum í oynni, segði hann.

– Tá ið tær smáu kommunurnar tosa um samanlegging, eru tað tær beru kávalótir. Kommunurnar siga, at tær vilja bara leggja saman í eina kommunu, men tær vita, at tað letur seg ikki gera, tí Vágs Býráð vil bara hoyra talan um tvær kommunur. Tað, sum tær smáu kommunurnar gera, er sostatt onki annað enn at krógva seg aftanfyri Vágs Býráð, segði ein hvassorðaður Bergur Bærendsen.

Hann vísti eisini á, at nógvar kommunur ræðast at leggja saman við Tvøroyrar Kommuna. tí skuldin skal vera so stór.

– Veruleikin er, at skuldin hjá Tvøroyrar Kommuna minkar í stórum og longu á nýggjárinum er hon komin niður á eitt støði, sum avgjørt er yvirkomuligt. Samstundis er kommunan væl útbygt, so samanumtikið er ongin kommuna í oynni er so væl fyri, sum Tvøroyrar Kommuna.

Hann harmaðist kortini, á, at framferðin hjá Landsstýrinum hevði sett allar ætlanir um samanlegging í oynni fleiri ár aftur í tíðina, tí nú er ósemjan í Suðuroynni enn størri enn hon hevur verið.

Somuleiðis mælti hann til, at Tvøroyrar Kommuna framyvir brúkti minni orku uppá samanlegging og meiri orku uppá at arbeiðið at menna kommununa.

### Mugu finna stevið aftur

Jaspur Vang helt, at tað var umráðandi, at kommunurnar í Suðuroy finna stevið aftur og Tvøroyrar Býráð eisini frameftir virkar fyri at savna alla oynna í eina kommunu.

Sjálvur helt hann, at einasti møguleiki var at leggja alla oynna í eina kommunu.

– Eg vil heldur hava 20 kommunur í Suðuroy, enn tvær. Verða tvær kommunur í Suðuroy, verður togan-in ímillum tær nógv harðari enn tað er nú, vit hava sjey kommunur. Samstundis er fólkatalið í Suðuroy so lítið, at landspolitisk fáa tvær kommunur, sum draga hvør sína línu, onga vekt. Verður Suðuroyggin tvær kommunur, fer tað sostatt at gera Suðuroynna enn veikari enn hon er í dag.

– Vágbingar vilja ikki leggja alla oynna í eina kommunu, tí teir føla at syðra helvt er ov veik afturímóti norðaru helvt. Men tað er ein spurningur, nær ein følir seg at vera nóg sterkan, segði Jaspur Vang.

Í hesum sambandi skal kortini viðmerkjast, at Sumbiar Bygdaráð hevur eisini alment boðað frá, at tað vil hava alla oynna í eina kommunu og har hevur eisini stórur meiriluti av fólkinum atkvøtt fyri einari kommunu í oynni á fólkaatkvøðu.

# Á Tvøroyri eru tey sinnað at líta frameftir

**Býráðslimir á Tvøroyri halda, tað ræður um at fáa sum frægast burturúr, hóast landsstýrið hevur tikið tær báðar størstu kommunurnar í Suðuroy av ræði**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Avgerðin er tikin og nú eiga vit ikki at liggja á latu síðuni, segði Pauli Einarsson, býráðslimur á Tvøroyri. Og tað eru fleiri aðrir býráðslimir samdir við honum í*

Nú ræður um at líta frameftir og at fáa sum best burturúr.

Tað halda fleiri býráðslimir á Tvøroyri.

Býráðsfundur var á Tvøroyri seinnapartin mikudagin og tá varð eisini mest umrødda mál í Suðuroy seinastu mánaðirnar, umrøtt.

Talan er sjálvsagt um ætlanina hjá Landsstýrinum at byggja skúledepil í Hovi og røktarheim í Vági. Ein meiriluti av Vágs býráði og eitt samt Tvøroyrar Býráð høvdu annars mælt landsstýrinum til at byggja skúladepilin í Vági og røktarheimið á Tvøroyri.

Teir, sum høvdu orðið á býráðsfundinum á Tvøroyri mikudagin, hildu, at hóast landsstýrið hevði skúgvað tær báðar størstu kommunurnar í oynni til viks, ráddi um at líta frameftir.

– Avgerðin er tikin og tað kunnu vit ikki annað enn taka til eftirtektar. Nú ræður um at líta frameftir og fáa sum mest burturúr støðuni, sum hon nú er, var høvuðssjónarmiðið hjá býráðnum á Tvøroyri.

Pauli Einarsson vísti á, at nú skúladepilin verður í Hovi, verður tað stutt at koyra á Tvøroyri, tá ið hovstunnilin er gjørdur.

– Vit eiga at hava í huganum, at skúlanæmingarnir skulu verða onkustaðni eftir klokkan 15. Vit hava verið fegin um at næmingarnir á heilsuskúlanum hava verið at sæð í býarmyndini á Tvøroyri og vit eiga at hugsa um teir ringvirkningar ein slíkur skúli hevur. Tí eiga vit ikki at liggja á latu síðuni, men at hugsa um, at útvega næmingunum innivist og at veita teimum tilboð og tænastur í frítíðini, helt Pauli Einarsson.

### Prógv um vánaligt stev í Suðuroy

Eisini Bergur Bærendsen helt, at spurningurin hjá Tvøroyrar Byráð nú, er, hvussu vit koma víðari út frá teirri støðu, sum er.

Hann fanst at landsstýrinum fyri at hava drigið kommunurnar í Suðuroy ígjøgnum hendan ellubitan, hóast tað til síðst vísti seg at verða púra týdningarleyst, hvat kommunurnar. hildu.

Hann vísti á, at tá ið Tvøroyrar Býrað gekk saman við Vágs býráði um at byggja skúladepil í Vági og Røktarheim á Tvøroyri, var tað ikki minst tí at útlit vóru fyri at leggja alla oynna í eina kommunu.

– Men skuldi samanlegging miseydnast, hevði úrslitið kortini verið, at ein stór byggiætlan varð sett í verk á Tvøroyri og tað hevði verið eitt stórt frambrot fyri Tvøroyri at fingið eitt projekt sum røktarheimið til býin.

Jaspur Vang helt, at tað er sera umráðandi, at Tvøroyrar Býráð hyggur frameftir útfrá tí støðu, sum er.

Hann ásannaði, at Tvøroyrar Býráð hevur eina serstaka skyldu mótvegis borgaranum í á Tvøroyri.

Men hann metti eisini, at úrslitið av øllum hesum málinum er besta dømi um, hvussu vánaligt stevið í millum kommunurnar í Suðuroynni er í veruleikanum.

– Vit megna ikki at standa saman í oynni og nú eru vit komin í tað ótrúligu støðu, at lokalu løgtingsmenninir eru gingnir ímóti sínum egna baklandi.

Men hann helt eisini, at Tvøroyrar býráð eigur sum skjótast at taka upp samband við hinar kommunurnar í Suðuroy um at byggja ætlaða røktarheimið.

Marjun Olsen helt, at tað var torført at skilja tað, sum er hent.

– Men fyri meg er tað avgerðandi, at vit nú koma víðari, tí vit noyðast at taka støðuna til eftirtektar.

Hon helt eisini, at tað hevði stóran týdning, at Tvøroyrar Býráð royndi at útvega skúlanæmingunum í Hovi innivist.

Kristin Michelsen, borgarstjóri fegnaðist um, at landsstýrið byggir skúlar. Men hann helt at tað var skeivt, at taka skúlar av teimum plássum, har teir vóru.

– Tað hevði svarað til, at fiskivinnuskúlin varð fluttur úr Vestmanna, segði hann.

Hann átalaði landsstýrið fyri at skúgva tær báðar stóru kommunurnar oynni til viks og segði, at hetta er eitt prógv fyri, at Suðuroyingar mugu avgreiða síni egnu viðurskifti sjálvir tí í landsstýrinum eingin hjálp at fáa.